# 2007

## ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR



# ÍF – TB

**1. deild menn**

**Leygardagin 30. juni 2007 Kl. 18.30 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

TOYOTA HARALDSEN -títt keyp- P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 3 2007**

**Útgevari:**
**ÍF-fótbóltur**

**Ábyrgd**
ÍF-fótbóltur

**Blaðnevnd**
Steinbjørn í Lambanum
Rógvi Róin

**Myndir**
www.lif.fo
Steinbjørn í Lambanum

**Kápumynd**
Frá dystinum ímóti LÍF
(Mynd: www.lif.fo)

**Prent**
Føroyaprent
tel 314555

**Uppseting**
Hannis Egholm
tel 311836

# TAÐ HALDA VIT

Tokið er helst koyrt! Tað mugu vit helst ásanna, tá tað viðkemur uppflyting í bestu deildina, hjá besta liðið okkara í fótbólti. Misjøvnu úrslitini í kappingini higartil eru longu farin at merkjast. Vit eru heili 15 stig aftanfyri nummar 1, sum er B68, meðan felagsliðið úr Vágunum FS Vágar 2005 eru sjey stig frammanfyri okkum. Hetta var neyvan tað, sum nevndin, leikararnir, venjararnir og áskoðararnir høvdu vóna. Tað tykist sum málið var greitt, áðrenn kappingarbyrjan, nevnliga, at besta liðið skuldi niður at venda og so beina kós aftur í Formuladeildina. Hesar vónir síggja hopleysar út nú! Vit halda, at vit hava stutt sagt mist ov mong stig, til at vera við í kappingini um tey bæði ovastu plássini, sum geva atgongd til Formuladeildina.

Hóast toftamenn hava verið suverenir í ár, so kann tað tykjast løgið, at munurin millum okkum og teir skal vera so stórur á stigatalvuni. Vit halda ikki leikaratilfari gevur hesar ábendingar. –Samanbera vit frá- og tilgongdin hjá okkum og B68 er lítil og eingin munur. Men gongdin á vøllinum sigur nakað annað, tíverri. Hví so er hava vit einki beinleiðis boð um. Eitt, sum kann staðfestast út frá fyrstu fjúrtan umførunum er, at B68 leikararnir halda javnari støði enn okkara menn og ikki minst, so hava teir eydnuna við sær í avgerðandi løtunum og dystunum. Tað eru teir báðir dystirnir vit hava leikt ímóti teimum nokk besta prógvið um. Í báðum førum fall avgerðin í seinastu minuttunum og báðu ferðirnar til teirra fyrimun. Spell, men veruleiki. Vit kunnu bara ímynda okkum um eydnan var við OKKUM ístaðin!

Góðan dyst og framhaldandi góða varmakeldustevnu.





**Dysturin í dag**

# Farið inn og spælið fóltbólt

Okkara spælara hava síðstu umførini fingið nøkur svingandi úrslit. Mikukvøldið spældu teir í Havn móti HB og sjálvt um teir vóru aftanfyri 1-0 í hálvleikinum, komu teir so líðandi meir inn í dystin og vunnu 3-1.

Vit hava nú TB, sum altíð er ein torførur dystur hjá okkum at vinna. Vit eru á einum 3. plássi við 25 stigum og TB á 5. plássi við 18 stigum. 12. mai spældu vit á Sevmýru og dysturin endaði 1-1, har vit høvdu fleiri góðar møguleikar, sum kundu ognað okkum sigurin. Men TB fekk útjavnandi málið í yvirtíðini, og so fingu vit bara eitt stig.

Tað, sum hevur eyðkent okkara spælara og harvið eisini úrslitini, er at "Nú MUGU vit vinna!!" Vit hava spælt 1 dyst í ár, har krøvini vóru so at siga eingin og tá kom nakað fram, sum vísti at okkara spælara eru sera góðir. Hetta var steypadysturin móti EB/Streymi og sjálvt um vit misti á stokkinum, so koyrdu allir fuglfirðingar stoltir til hús tað kvøldið.

Hetta burdi fingið okkum øll til at sæð, at lata vit dreingirnar fara inn á vøllin fyri at SPÆLA fótbólt, so hava teir nógv í skjáttuni at bjóða. Síðstu dystirnar eru spælarnir farnir á vøllin og mest tí teir eru villaroy, megna teir ikki at veita meir enn helvtina av sínum kapasiteti.

Vit hava mist nøkur umráðandi stig í oddastríðnum, men sigast kann, at tvey tey best spælandi liðini eru fremst ídag. Av tí at heili 13 dystir eru eftir, verður tað óhugaligt hjá okkara monnum at spæla restina av kappingarárinum, um vit ikki eggja teimum til at fáa fram aftur spæligleðina og harvið viljan og harvið og samhaldi og harvið dygdina og harvið...

So til tykkum dreingir: SPÆL fótbólt.

Og til okkum onnur: Lat teir SPÆLA fótbólt, tí tað er sjálvvirkandi til at teir megna meira (og tað er stuttligari at hyggja eftir).

Góðan dyst!

# HAVSBRÚN

Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

## HYDRAULIKK-SLANGUR

KJ Hydraulik er veitari av fyrsta floks hydraulikkslangum til kundar í Føroyum, Danmark, Íslandi, Hetlandi, Skotlandi og Norra.

Vit útvega allar hydraulikkslangur skjótt og væl. Slangurnar verða framleiddar á goymslum okkara á Kambsdali og í Havn.



Slangurnar fáast við 1-lags, 2-lags, 4-lags og 6-lags stálarmering. Støddir eru frá 3/16" til 2".

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

**Kambsdalur:** 530 Fuglafjørður **Tórshavn:** 110 Tórshavn • Myklinesgøta 3
Tel 444 170 • Faks 444 265 • info@kj.fo • www.kj.fo





# P/F Petur Larsen

## Mekaniskur verkstaður

postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco







BYGGIRÁÐ

TIMBUR . AMBOÐ . INNBÚGV

-alt á einum stað!

TIMBURHANDILIN

Runavík Tel. 477272 . Fuglafjørður Tel. 444126 . Klaksvík Tel. 455149

opið er soleiðis:

mánadag-fríggjadag 18.00-23.00
leygardag 17.00-23.00
sunnudag 09.00-10.30 og 14.00-23.00





# Meg minnist !

Í hesum teigi, sum vit hava valt at kalla "Meg minnist" fara vit at leita upp fyrrverandi ÍF´arar, fara at siga teirra ÍF-søgu og eitt sindur um lív teirra nú.



Gesturin, ella fyrrverandi ÍF´arin í dag, er fyri mongum ímyndin av kvinnufótbóltinum í Fuglafirði farnu øldina,

## Hildur Nielsen

**Fødd:**
Í Fuglafirði í 1964

**Byrjaði at leika við ÍF:**
Byrjaði at spæla fótbólt, Norði á bakka, sum barn.Saman við Einar Toftegard, Hallur Petersen, Karl Jøkladal, Páll Silvan Ennigarð, Rúna Hansen og Edva Jacobsen

**Á besta liði fyrstu ferð:**
Eg haldi eg var 16 ár

**Dystir og tilburðir eg minnist:**
Eg minnist best tá kvinnufótbólturin byrjaði, hvussu spentar vit vóru. Eg haldi vit spældu fyrsta dyst móti EB.

**Leikarar eg minnist best:**
Tær eg leikti mest saman við vóru fleiri. Eg kann nevna: Anniku Egholm, Sigbjørg Joensen, Kaju Toftegård, Anju Petersen, Kristiannu Petersen, Gunnvør Á Brúnni, Áshild Kristiansen Eilin Jacobsen og Marjun Djurhuus. Leikarir eg minnist best, vóru verjuleikarar eins og eg sjálv.

**Venjarar mær dámdi :**
Hjalmar Joensen var okkara fyrsti venjari. Hann koyrdi á okkum, og so gav hann okkum onkuntíð salvu at smyrja uppá vøddarnar (hestasalvu blm.). Jú, vit smurdu nokk á, kanska ov mikið. (tað svíður enn :-) Margar Hansen var eisini ein góður venjari.

**Fótbóltur aftaná ÍF:**
Eg flutti til Århus 1984. Spældi við ASA, ið var eitt serіulið í DK.. Hetta ASA-liðið var í Fuglafirði og vitjaði í 1985 ella 86, og spældi móti ÍF. Eisini havi eg leikt við B36 í nøkur ár. Eg gavst sum 29 ára gomul.

**Lærdómur, familja og lívið:**
Eg havi útbúgving sum gartnari, og havi fingist nógv við urtagarðar o.a. Nú arbeiði eg í Miðstøðini í Gundadali, har eg ansi børnum og passi urtagarðin.

**Børn og ítróttur:**
Eg eigi tvær døtur Maibrit 12 ár og Heidi 8 ár, tær spæla við B36, og gera fimleik um veturin. Eg haldi, at tað er gott at fáast við ítrótt. Sjálv vil eg siga, at tað var gott at vaksa upp í Fuglafirði, og eg havi nógv góð minnir frá fótbóltstíðini har. Eg eri gift við Finnur Andreasen, sum eg møtti tá ið eg var í B36.

**Fótbóltur í dag:**
Tey ungu hava sera góðar umstøður. Nú hevur næstan hvør bygd vøll, so teir yngru leikararnir kunnu mennast. Í teimum ovastu deildunum eru pengarnir farnir at stýra ov nógv.
: Eg ynski tað besta fyri ÍF, fá Havsbrún og Frammherja, at spýta pengar í felagið.

**Góð ráð til ÍF:**
Hildur endar við at ynskja ÍF og okkum øllum alt tað besta. Hon heldur, at stóru fyritøkurnar, Havsbrún og Framherji, kanska skuldu stuðla ÍF meira, men vit í blaðnevndini kunnu upplýsa, at ÍF tey seinastu árini hevur fingið serstakliga góðan stuðul frá júst hesum báðum, umframt fleiri øðrum.













# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak
býurin, har náttura og fólk eru blíð
býurin, har fortíð og nútíð hittast
býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**
býurin, har nógv hendir
býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo

# Rustviðgerð ella forrútar

vit hava loysnina

BE AUTOGLAS

Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876

fk

Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

## Fuglafjarðar Træsmiðja

**Snikkaraarbeiði**

- Vindeygu
- Úthurðar
- Trappur
- Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

## Piddasahandil og Ribarhús

listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«

opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27



hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði

## P/f Sveisingahandilin

Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 311909

## SANDGREVSTUR P/F

Norður í Gerði 7
530 Fuglafjørður

Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur
- Rall
- Sandblásisandur
- Betongflísar

**Koyring við kranalastvognum fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)**

**tel 444121 • 595900 • 595910**

we make fishing more profitable

**Vit framleiða og umvæla:**

- Rækjutrol
- Botntrol
- Flótitrol
- Semi-pelagisk trol
- Snurpunótir



**Vit framleiða ta nýggju skiljiristina til:**

- Pelagiskan fiskiskap

**Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:**

- Vaska og impregnera nótir
- Veita komplettar fortoyningar

Vit hava útgerð til trol, nótir og alivinnuna á goymslu

**VÓNIN**
www.vonin.com

Vónin Ltd.
P.O. Box 19
FO-530 Fuglafjørður
Tel + 298 47 42 00
Fax – 298 47 42 01

Vónin Tórshavn
Vestara Bryggja 12
FO-100 Tórshavn
Tel – 298 35 43 91
Fax – 298 31 33 19

## POUL JOENSEN
AVSKERING AV SKRÚÐUM

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95

- Avskering av skrúðum
- Myndaupptøka
- Videoupptøka
- onnur smá arbeiði



## BERGFROST
COLD STORAGE

P.O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 474 646
Fax +298 474 647
Mobile +298 223 667
bergfrost@bergfrost.com

## POUL JOENSEN
LAST & KRANAVOGNSKOYRING

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað





FRUMSÝNING

## ACTYON

pers 308.056 v/mvg
van 264.214 v/mvg



## SSANGYONG

Spildurnýggi Actyon borgar fyri nýskapandi sniðgeving, tí nú snýr tað sum ein einastandandi sportscoupé við SUV-eginleikum. Innrættaður við svørtum designaraelementum, styladur við kromi og leðurratti, veitir hann meinlíkar upplivingar í tráð við sports- og coupébilar, sum er nakað heilt nýtt innan SUV-heimin. Samstundis veitir smarta SUV-sniðið fullkomna koyrivælveru umframt eitt sera hent vørurúm. Actyon fæst við 2.0 Commonrail dieselmotori, ið veitir 141 hestar og hevur eit moment uppá 310 Nm. Hann megnar at sleipa ikki minni enn 2,1 tons, so eingin trupuleiki er at fáa rasarabátin við uppá krókin. Minnst til at sjálvt standardútgerðin er full av útgerð millum annað ESP, ARP, HDC, ABS, ABD, ektað 4x4, dubult airbags, gardin airbag, útvarp/fløguspælari og el-síðuspegl. KOYR ACTYON, SKIL TEG ÚT.

LUKSUS
4WD

SSANGYONG
www.ssangyong-faeroerne.dk

NÝGGJUR

7 pers. +viðføri



**KYRON CURIOUS**
pers 324.849 v/mvg
van 248.089 v/mvg

**REXTON II**
pers 403.294 v/mvg
van 296.979 v/mvg

**RODIUS**
pers 319.258 v/mvg

## BILVERKSTAÐIÐ

**v/Hans Jacob Kollsker Á Hjalla Tel 311013 Fax 321015 www.kollsker.com**

**Lastvognskoyring**



Øll lastvognskoyring verður gjørd

**Kári Zachariassen**

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245




SKIPASMIÐJAN

www.faroeyard.fo

Sp/f **Jan Mohr**
**Byggivirkið**

Tlf: 21 99 49 • 21 89 49

**URTAGARÐURIN**

V/RITU LARSEN
TEL.: 22 38 12

**PROLAKK** — FØROYA MEST FRAMMKOMNI PLÁTU- OG LAKKERINGSVERKSTAÐUR



PROLAKK
Í februar 2007 byrjaði Prolakk sítt virksemi í nýggjum hølum hjá P/F Bilasøluni við Vegnum Langa í Hoyvík. Eyðkenni við Prolakk verður at veita eina dygdargóða tænastu, við framkomnum tóli har kundin er í hásæti. Skjótt og væl úr hondum greitt arbeiði verður eyðkenni hjá fyritøkuni.

Verkstaðurin heldur til í sera snotiligum hølum við framkomnum amboðum. Í felagnum starvast fólk við sera drúgvum royndum, sum hava nógv ár á baki innan plátu- og lakkeringsarbeiði. Eisini nýtur verkstaðurin einans umhvørvisgóðkent tilfar.

Hevur tú tørv at fáa skaða gjørdan, tryggingarskaða ella skaða yvirhøvur, set teg í samband við okkum, so sýna vit bilin eftir avtalu.

www.prolakk.fo
prolakk@prolakk.fo

SP/F PROLAKK • VEGURIN LANGI • 110 TÓRSHAVN • POSTSMOGA 1393 • TLF.: 311252 • FAX: 311253



**FINNUR FRÍÐI • FD 86**



**TRÓNDUR Í GØTU • FD 175**

**P/F VINNAN**
**GØTU**




**KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI**
INFORMATION OFFICE

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

---

**FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388













Jørleif Petersen
málarameistari

Fuglafjørður
tel. 444 395 fartel. 214 395

Alt málaraarbeiði verður gjørt!


## Vevmeistari søkist!

Heimasíðan hjá ÍF fótbólti sóknast eftir áhugaðum vevmeistara at taka sær av heimasíðuni.

Vit vænta, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, dugir at skriva og ert rímuliga kringur í teldu.

Um hetta hevur tín áhuga, send ein teldupost til if-studlar@kallnet.fo

ÍF







P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR

N. Finsensgøta 5 Tórshavn Tel 35 53 00 | Gøtuvegur Gøtu Tel. 44 73 98



Rasmus Joensen

Málarameistari

530 Fuglafjørður

Tel. 444 139 - 214139





SPEKT statsaut. revisorar spf,
spekt@spekt.fo, www.spekt.fo

SPEKT statsaut. revisorar










**Framhaldandi góða Varmakeldustevnu!**






NISSAN 4x4. NATURALLY CAPABLE.




PATHFINDER. X-TRAIL. NAVARA. PATROL. MURANO. Størsta og breiðasta úrvali av 4x4.

Auto Service
www.autoservice.fo



**Tannlæknastovan**

**Steintór Larsen** | tannlækni

**Elin Stampe** | tannrøktari

**Viðtala:**
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 | 530 Fuglafjørður | tel 444 358

HVÍ VELJA EINA KNASSAR HEIMASÍÐULOYSN?

**Ein Knassar Lime heimasíðuloysn hevur m.a. hesar fyrimunir:**

- fær góð leitiúrslit á Google og øðrum leitimaskinum.
- sær líka út í øllum browsarum og á øllum teldusløgum.
- koyrir á skjótum og tryggum servara, við m.a. dagligum back-up og døgnvakt.
- sniðið kann uppfrískast eftir tørvi, uttan at skifta skipan ella broyta nakað í innihaldinum yvirhøvur.
- tað er altíð onkur knassi klárur at hjálpa, um spurningar eru.




Ring í dag á 73 33 33 ella skriva til knassar@knassar.fo og hoyr, hvussu tú kanst fáa bestu heimasíðuloysnina. Vitja www.knassar.fo fyri at síggja ymiskar Knassar heimasíðuloysnir.

Á Knassar starvast 21 fólk, ið brenna fyri at gera heimsins bestu heimasíðuloysnir. Knassar hava fleiri enn 100 heimasíðukundar í Føroyum og uttanlanda.




# ÁRSINS ÍF-ARI 2007

## Tímir EINGIN at atkvøða?

Heldur ikki í spennandi toppdystinum á heimavølli seinast ímóti felagsliðnum úr Vágunum, tímdi nakrar at lata atkvøðu inn í kappingini um ársins ÍF´ara 2007. IKKI tí, fleiri leikarar kundu verið um boðið, men tað hildu áskoðararnir nokk ikki.

Vit royna einaferð enn – men hetta verður so seinastu ferð. Um eingin atkvøða kemur inn til dystin í dag, verður kappingini strikað!

So vita tit tað.

Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Keypssamtøkuni

fk

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-TB, 30. juni 2007

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Besti leikarin verður kunngjørdur í komandi leikskrá

Nr 1 (5 stig) ____________________

Nr 2 (3 stig) ____________________

Nr 3 (2 stig) ____________________

Veljari / tel: ____________________



## STØÐAN 1. DEILD - 28. JUNI

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 (n) | 14 | 13 | 1 | 0 | 48 - 9 | 40 |
| 2 | FSV04 | 14 | 10 | 2 | 2 | 28 - 17 | 32 |
| 3 | ÍF (n) | 14 | 7 | 4 | 3 | 33 - 14 | 25 |
| 4 | LÍF | 14 | 7 | 1 | 6 | 29 - 21 | 22 |
| 5 | TB | 14 | 5 | 3 | 6 | 19 - 15 | 18 |
| 6 | NSÍ (u) | 14 | 6 | 0 | 8 | 28 - 34 | 18 |
| 7 | SÍ | 14 | 4 | 3 | 7 | 17 - 25 | 15 |
| 8 | HB | 14 | 4 | 2 | 8 | 20 - 32 | 14 |
| 9 | KÍ | 14 | 3 | 2 | 9 | 17 - 34 | 11 |
| 10 | B36 (u) | 14 | 1 | 2 | 11 | 9 - 47 | 5 |

## LEIKARAHAGTØL 1. DEILD 2007

| | Leikari | Min | D | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | András Gango | 990 | 11 | - | - | - | - | (10) | - |
| 2 | Áki Petersen | 936 | 11 | 2 | - | - | - | - | - |
| 3 | Tórður Lervig | 669 | 9 | 4 | 1 | 1 | - | - | - |
| 4 | Nenad Saric | 976 | 11 | 1 | - | 1 | - | 6 | - |
| 5 | Elvan Taser | 860 | 11 | 3 | 1 | 2 | - | 2 | - |
| 6 | Bartal Eliasen | 867 | 9 | 2 | 1 | 2 | 1 | 6 | - |
| 7 | Aleksander Jovevic | 605 | 8 | 4 | 1 | - | - | 2 | - |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 720 | 8 | - | - | 2 | - | - | - |
| 9 | Amin Fallah | 498 | 9 | 4 | 2 | - | - | 2 | - |
| 10 | Atli Petersen | 548 | 10 | 3 | 6 | 1 | 1 | 4 | - |
| 11 | Frank Poulsen | 810 | 11 | 2 | 2 | 1 | - | - | - |
| 12 | Árni Petersen | 733 | 9 | - | 1 | 2 | - | 1 | - |
| 13 | Dánjal Pauli Højgaard | 236 | 5 | 2 | 2 | 1 | - | 3 | - |
| 14 | Jan Ellingsgaard | 104 | 5 | - | 6 | - | - | 1 | - |
| 15 | Heri Nesá | 360 | 4 | - | - | 1 | - | - | - |
| 16 | Emil Toftegaard | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 17 | Høgni Zachariassen | 990 | 11 | - | - | 1 | - | - | - |
| 18 | Vincent Jacobsen | 184 | 5 | 1 | 4 | - | - | 2 | - |
| 20 | Uni R. Petersen | 4 | 1 | - | 1 | - | - | - | - |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í 1. deild í dag – 15. umfar**

B68 – HB
KÍ – B36
NSÍ – FSV04
SÍ - LÍF

**Dystir í 1. deild mikudagin 4. juli – 16. umfar**

HB - TB
FSV04 – LÍF
B36 – ÍF
KÍ – B68
NSÍ - SÍ

**Dystir í Formuladeildini sunnudagin 1. juli – 15. umfar**

B36 - GÍ
VB/Sumba – HB
NSÍ – EB/Steymur
B71 – Skála
KÍ – AB (mikudagin 4. juli)

**Dystir í 2. deild**

2. deild er farin í summarsteðg.

**Málskjúttar 1. deild**

Andrzej Stretowicz, FSV 13
Jósup Henriksen, B68 11
Alexandru Castilho,B6810
Adrian Joensen, LÍF 9
Sonni L. Petersen, NSÍ 9
Bartal Eliasen, ÍF 8

### VERT AT VITA

Dysturin í dag móti felagsliðnum úr Vágunum, FS Vágar 2004, er næsti dysturin ímóti teimum í ár. Fyrsti dysturin varð leiktur á Tvøroyri 12. mai. Sum 3 aðrir dystir hjá okkara monnum higartil í ár, endaði hesin við 1-1 javnleikt. Málið skoraði Elvan. Útjavnandi málið fingu tvøramenn í yvirtíðini, og tað skoraði Óliver Abrahamsen.

Skulu vit gera okkum vón um rokka seinna uppflytingarplássinum – tí B68 fer nokk við øðrum – mugu vit vinna í dag. Vit eru áðrenn dagsins dyst 7 stig aftanfyri FSV04 á 2. plássinum, so tað verður helst trupult at fáa teir aftur.

ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1 Andràs Gàngo
2 Áki Petersen
3 Tórður Lervig
4 Nenad Saric
5 Elvan Taser
6 Bartal Eliasen
7 Aleksander Jovevic
8 Fritleif í Lambanum (liðsk.)
9 Amin Fallah
10 Atli Petersen
11 Frank Poulsen
12 Árni Petersen
13 Dánjal Pauli Højgaard
14 Jan Ellingsgaard
15 Heri Nesá
16 Emil Toftegaard
17 Høgni Zachariassen
18 Vincent Jacobsen
20 Uni R. Petersen

**Venjari:**
Jón Simonsen
**Hjálparvenjari:**
Roy Róin
**Liðleiðarar:**
Símun Fornagarð
Dia Jacobsen

## TB-LIÐIÐ

1 Ivan Stojkovic
2 Búi Mortensen
3 Kim Roest
4 Bergleif Sólsker
5 Daniel Nyanko
6 Gunnleif Olsen
7 Einar Petersem
8 Birgir Rasmussen
9 Allan Poulsen
10 Olivur Abrahamsen
11 Jón Tórður Holm
12 Kai Roest
13 Óli Johannesen
14 Teitur Magnussen
15 Michael Bertholdsen
17 Dan Mortensen

**Venjari**
Milan Cimburovic
**Hjálparfólk**
Aron Sørensen

**Jón Kári í Brekkuni - hjálpardómarar úr KÍ**

**M/B EYÐIN**